Virkir og almennir stovnar skulu rinda eitt gjald, sum býráðið ásetir fyri at fáa rottangar og reinsiverk tømd. Gjald fyri at tøma rottanga og reinsiverk kann broytast frá ári til árs. Tú kanst finna gjøld, sum er í gildi, á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu: www.torshavn.fo

Um støðd ella staðseting av tanga hevur eykaútreiðslur við sær í sambandi við at hann verður tømdur, verður rokning send eigaranum fyri eykaútreiðslurnar.

## GÓÐ RÁÐ

- Koyr ongantíð vandamikið burturkast í kloakkina. Vandamikið burturkast er t.d. kemikaliir, olja og heilivágur. Tað skaðar umhvørvið, heilsuna hjá fólki, sum arbeiða upp á kloakkina og kloakkina sjálva.

- Einnýtislappar, bind, blæur, vattpinnar, hítir, hár og tílíkt, **skal ikki verða tveitt í WC-kummuna,** men í ruskposan.

- Planta ikki trø tætt við kloakkina, tí trærøtur leita sær eftir vatni, og eru kloakkrør rivnað, oyðileggja røturnar rørini ella tippa tey.



NOVEMBER 2014

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Tórshavnar kommuna**
Postsmoga 32 · FO-110 Tórshavn
Telefon 302010 · torshavn@torshavn.fo

Mánadag-hósdag kl. 9-16
Fríggjadag kl. 9-15

# Rottangar og reinsiverk



www.torshavn.fo

# Rottangar og reinsiverk

**Hví hava eina tømingarskipan?**

Endamálið við eini tømingarskipan er at tryggja, at allir rottangar, reinsiverk o.a. verða tømd eina ferð um árið. Hetta er neyðugt til tess:

- at halda vatnið í áum, løkjum og vøtnum reint – tað gagnar djórum og plantum
- at evja og spillivatn verður reinsað rætt – tað gagnar umhvørvinum øllum.

**Brot úr kunngerð nr. 186 frá 05.11.1993 um spillvatnsevju**

**§ 3** Kommunustýrið hevur skyldu til at vísa á ein góðkendan tømingar- og burturbeiningarmøguleika fyri alla spillvatnsevju, jvb. § 5.

Stk. 2. Húsaánarar, stovnar, virkir o.o. hava skyldu til at nýta tann av kommunustýrinum ávísta tømingar- og burturbeiningarmøguleikan.

## PASSAR TANGIN SEG SJÁLVAN?

Vanlig hugsan millum manna er, at tangin passar seg sjálvan, og at tess longri tíð gongur ímillum hvørja tøming, tess betur virkar hann. Tað er ein stór misskiljing!

## HVUSSU VIRKAR TANGIN?

Tangin skal fyribyrgja, at tey evni, sum eru tyngri ella lættari enn vatn, verða leidd út í umhvørvið. Tangin, sum skal vera fyltur við vatni upp til frárensluð, virkar á tann hátt, at tey evni, sum eru tyngri enn vatn, søkka á botn og gera botnevjuna ella gruggið, tey evni, sum eru lættari enn vatn, flotna og gera flotlagið (skorpuna). Skulu hesi evni hava tíð at skilja seg frá vatninum, eigur tangin at vera so stórur, at spillivatnið hevur uml. 1 samdøgur at koma í gjøgnum tangan.

Tangin hjá einum miðal húsarhaldi er eftir einum ári hálvur av evju og eigur at verða tømdur, skal hann virka, sum hann eigur. Annars fyllist hann, og spillivatnsevjan rennur beinleiðis gjøgnum tangan og út í umhvørvið.

Er tangi, sum ikki er tømdur í fleiri ár, næstan tómur, kemst tað av, at botnevjan gerar og framleiðir gass, sum hevur við sær, at gruggið verður rivið upp og sogið út saman við vatninum. Í báðum førum dálkar tangin okkara umhvørvi.




## ATKOMA

Eigarar eiga at síggja til, at tað slepst til rottanga og reinsiverk. Hesi viðurskifti eiga at verða í lagi, áðrenn tømt verður:

- At tangin er lættur at koma til
- At tað er griviið væl frá rundan um lokið
- At lokið er væl fest, men lætt at loysa, tá ið tømt verður
- At lokið er trygt og heilt
- At lokið er lætt at festa aftur, tá ið arbeiðið er liðugt
- Lokið má ikki viga meira enn 25 kg
- Teinurin frá botninum á tanganum til bilin má ikki vera longri enn 60 metrar
- Hæddarmunurin frá botninum á tanganum til støðupláss hjá bilinum má ikki vera meira enn 8 metrar
- Óviðkomandi lutir og evni mugu ikki vera í tanganum




## TØMING

Umleið 2 vikur áðrenn tangin skal verða tømdur, sendir kommunan út eina fráboðan og sigur, nær tangin verður tømdur.

Er tangin ov lítil sbr. ásetingum frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, kann kommunan gera av, at tømt verður oftari.

Eigari eigur at biðja um eykatøming eftir tørvi, umframt ta kravdu árligu tømingina.

Eigari eigur at boða kommununi frá, tá ið rottangi og reinsiverk verða sett upp, flutt ella tikin burtur.

## GJALD

Privatborgarar gjalda ikki fyri at fáa rottanga og reinsiverk tømd eina ferð um árið. Verður neyðugt at tøma oftari enn kravdu ferðina, ella um atkomutreytinar ikki eru fylgdar, rinda privatborgarar eitt eykagjald.